


## **Stongt** vegna starvsfólkadag

Vegna starvsfólkadag er Klingran, Føroya Tele í Hoyvík, stongd **fríggjadagin 2. novembur 2007.**

Telebúðirnar kring landið hava opið sum vanligt, og um átrokandi boð eru, kann ringjast á telefonnr. 808080.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum

---

# stuðulsfólkaskipanin fyri børn

www.almannastovan.fo

## Sóknast verður eftir ***náttarstuðlum*** til Streymoyar og Eysturoyar øki

Søkt verður eftir álítandi hjálparfólkum at vera náttarvakt heima hjá børnum, ið bera brek. Søkt verður bæði eftir fólki til føst størv og eftir avloysarum.

Arbeiðsstaðurin er heima hjá børnunum, og umráðandi er tí, at náttarstuðlarnir duga at laga seg til og at virða umstøðurnar í heiminum.

Náttarstuðlarnir fara at vera savnaðir í eitt røktartoymi. Í toyminum fer stórur dentur at vera lagdur á førleikamenning innan røkt og kreppustøður.

Fyri at tryggja børnunum tann stuðul teimum tørvar, er neyðugt at toymið lagar seg til umstøður, ið tíðum broytast. Stuðulsfólk kunnu tí vænta, at verða biðin at arbeiða við ymiskum børnum, tá aðrir stuðlar hava forfall, ella tá umstøðurnar annars gera tað neyðugt.

Søkt verður bæði eftir fólki við útbúgving innan heilsu- og røktarøkið, og eftir ófaklærdum hjálparfólkum.

## Sóknast verður eftir ***stuðlum*** til meginøkið

Søkt verður eftir fólki til ansing, røkt og fylgjarauppgávur. Uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar. Arbeiðstíðin er skiftandi, og kann eisini fara útum vanliga arbeiðstíð. Í løtuni eru arbeiðsuppgávurnar í meginøkinum.

Arbeiðsuppgávurnar og tíðirnar vera lagaðar til tørvin hjá børnunum, ið fáa stuðul. Talan er tí vanliga um ymiskar samansettar uppgávur, ella at stuðlar arbeiða niðursetta tíð.

Søkt verður tí bæði eftir fólki sum ynskja at arbeiða sum stuðulsfólk burturav, og eftir hjálparfólki, sum ynskja at arbeiða nakrar tímar um vikuna. Tí eru lesandi, eitt nú innan heilsu- og námsfrøði eisini vælkomin at søkja.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Fevnir sáttmálin hjá yrkisfelagnum ikki um størv ið líkjast hesum, verður lønt sambært sáttmála fyri hjálparfólk millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknarfreistin er 13. november 2007 kl. 12.00. Skrivlig umsókn og møgulig prógv og viðmæli skulu sendast til:

Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Almannastovan, Tinghúsvegur 14, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til stuðulsráðgevararnar, allar yrkadagar millum kl. 10 og 15 á tel. 35 35 70.

KREA